
Veðrið




Fimm – daga-for-søgnin frá DMI


Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Hann veksur vindin til skrið ella storm av landsynningi, samdrigið og regn. Út á dagin snarar hann í útsynning og veksur vindin til hvassan storm. Hitin kemur upp í eini 5 stig. Leygarnáttina hækkar hann upp í vestan og tað klárar í, tó ælingur.



Veðrið leygardagin:
Hvassur stormur av útsynningi og vestri, seinni útnyrðingi, men sum frálíður minkar han vindin nakað. Ælingur og hitin um 5 stig.



Veðrið sunnudagin:
Upp í storm av útnyrðingi, men hann minkar vindin og mánanáttina gul av ymsum ættum. Ælingur, sum frálíður vátaslettingur ella kavi. Hitin millum frostmarkið og 3 hitastig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Hann veksur vindin upp í ein stríðk av eystri og yvirhøvur turt. Hitin kemur upp í eini 5 stig. Týsdagin hækkar hann upp í norðan við ælingi og kaldari veðrið.

815 grindahvalir og 415 springarar

Árið í fjør var ikki av teimum heilt grovu árunum til grind.

Eitt yvirlit frá Føroya Náttúrugripasavni vísur, at í fjør løgdu 12 grindir beinini í Føroyum.

Av teimum vóru átta grindir við tilsamans 815 grindahvalum uppá tilsamans 6.001 og 1/2 skinn, ella 30 gyllin og 1 og 1/2 skinn

Hinar fýra grindirnar vóru við hvítskjórutum springarum, tilsamans 438 í tali.

Yvirlitið hjá Náttúrugrindasavninum vísur, at størsta grindin í fjør var eisini tann fyrsta.


Tað var grindin í Hvalba, har 251 grindahvalir uppa tilsamans 1.248 og 1/2 skinn løgdu beinini.

Størsta gdindin við springarum var eisini í Suðuroy. Tað var grindin tann 22. september, tá ið 219 hvítskjórutir springarar løgdu beinini.


Talvan vísir annars, hvar grindirnar doyu, nær og, hvussu stórar tær vóru.

Grindir 1998


Dagur	Hvalvág	Hvalir	Skinnatal	Slag
15. juli	Hvalba	251	1.248 ½	grindahvalir
23. juli	Bøur	54	410	grindahvalir
24. juli	Sandavágur	66	448	grindahvalir
27. juli	Fámjin	167		hvítskjórutir springarar
29. juli	Hvannasund	170	1.488	grindahvalir
30. juli	Gøta	111	1.097	grindahvalir
28. juli	Hvannasund	49	406	grindahvalir
13. sept.	Fuglafjørður	16		hvítskjórutir springarar
22. sept.	Tvøroyri	219		hvítskjórutir springarar
22. sept.	Hovsfjørður	36		hvítskjórutir springarar
2. nov.	Sandur	59	577	grindahvalir
25. nov.	Hvalvík	55	327	grindahvalir
Tilsamans	8 grindir við	815		grindahvalum upp á 6.001 ½ skinn ella 30 gyllin og 1 ½ skinn
Tilsamans	4 grindir við	438		hvítskjórutum springarum




Eitt lágtrýst tekur seg upp sunnanfyri Ísland, fer í landsynning eystan og verður yvir Føroyum í kvøld. Aftaná kemur ein veikur hátrýstryggur.



Eitt stormlágtrýst fer framvið Føroyum norðanfyri leygarnáttina og aftaná kemur kaldur útnyrðingsstreymur við ælingi. Fyrst í næstu viku fer aftur eitt lágtrýst framvið Føroyum sunnanfyri.



Hitalagið mált frá 13./01. kl 06⁰⁰–14./01. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 1,7°C
Minsti hiti máldur í jan.: -8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°



Avfallið: 2,3 mm – **mált frá 13./01. kl 6⁰⁰–14./01. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í januar: 68,3 mm

Hitalagið kring knøttin

Ilulisat	-16
Nuuk	-11
Qaqortoq	-6
Ammassalik	-9
Saint John's	2
Halifax	2
Reykjavik	-5
Seyðisfjørður	-1
Tórshavn	2
Lerwick	3
Aberdeen	2
London	5
Tromsø	-6
Bergen	-3
Oslo	–
Stokkhólm	-7
Keypmannahavn	-2
Helsinki	-9
Moskva	-3
Berlin	-2
Warzawa	0
Kiev	-2
Bukarest	0
Paris	4
Madrid	–
Róm	10
Malorca	–
Athen	10
Malta	16
Tunis	18
Beijing	-2
New Dehli	9
Bangkok	29
Jakarta	30
Sydney	21
New York	10
Miami	23
Los Angeles	13
Meksikobýur	18
Panama	–
La Paz	–
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	27

Kelda: DMI

Vestfalskyrrindi

11. januar: Mánin longst frá jørðini
17. januar: Tendring

	Suðuroyar-/Vágafirði fp	sp	Vestmanna-sundi fp	sp	Nólsoyar-firði fp	sp	Haraldssundi/Leirvíksfirði fp	sp	Skúvoyarfirði/Skopunarfirði fp	sp	Hestfirði/Sundalagnum fp	sp
15. jan.	0446	1709	0646	1909	0301	1524	0501	1724	0346	1609	0401	1624
16. jan.	0532	1755	0732	1955	0347	1610	0547	1810	0432	1655	0447	1710
17. jan.	0618	1842	0818	2042	0433	1657	0633	1857	0518	1742	0533	1757
18. jan.	0705	1928	0905	2128	0520	1743	0720	1943	0605	1828	0620	1843


Føroya størsta úrval av
PAKKITILFARI
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:
* **Plastbakkar**
* **Pakkibond, tape**
* **Merkir, etikettir**
* **Knivar**
* **Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.**
* **Ymisk tól til ídnaðin**
* **Reingerðisevnir**
* **Tilsetningarevnir**
* **Plattar**
* **Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari**

... sjálvandi fyri besta prísin!

FARPACK
P.O. Box 171,
FR-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 314295
Telefax (+298)319107/314968

GRAV-STEINAR



Sera bíligir gravsteinar kunnu fáast við at venda sær til:
Tlf. 371345
ella 371687

Frá
Pizzaria/ Skáanum
Nú er opið aftur

Fjølbroyttur matseðil

Opið er allar dagar frá kl. 11–23.30
Pizzaria/Skáin tlf. 318866

